menta
skrásettir grannskoðarar

# EB/Streymur

# Oyrabakki

(V-tal 414 069)

# Ársfrásøgn

# 2023

Ársfrásøgnin framløgd og góðkend á aðalfundi tann 29 / 1 2024.

fundarstjóri

## INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðslufrágreiðing | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 5 - 6 |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 – 8 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 – 11 |
| Peningastreymsyvirlit | 12 |
| Notur | 13 –16 |

menta
skrásettir grannskoðarar

# UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

EB/Streymur
Postrúm 18
FO-405 Oyrabakka

| | |
|---|---|
| Telefon: | +298 29 33 33 |
| T-postur: | ebstreym@olivant.fo |
| Heimasíða: | www.eb-streymur.fo |
| V-tal: | 414 069 |
| Stovningardagur: | 23. januar 1993 |
| Skattakommuna: | Sunda Kommuna |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |

**Starvsnevnd**

Rógvi Egilstoft, formaður
Egil á Bø, varaformaður
Djóni J. Eidesgaard, peningarøkil
Beinta Lisberg, nevndarlimur
Judith S. Jacobsen, nevndarlimur

**Grannskoðari**

**MENTA Sp/f**
skrásett grannskoðanarvirki Sp/f
J. Broncksgøta 16
Postboks 16, FO-110 Tórshavn
Telefon 310 901, Telefax 319 640
t-postur: menta@menta.fo
www.menta.fo

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

**Endamál og høvuðsvirksemi**
Endamál og høvuðsvirksemi felagsins er at íðka fótbólt.

**Ársúrslitið**
Ársúrslitið er 66 tkr. í 2023. Nýggja nevndin, sum tók við við roknskaparenda, er ikki nøgd við úrslitið og arbeiðir tí við betra um hetta við at tillaga raksturin og útvega neyðugt gjaldføri.

**Fíggjarstøðan**
Eginpeningurin við árslok er -658 tkr.

**Hendingar eftir roknskaparárslok**
Eftir roknskaparárslok eru ikki farnar fram hendingar, sum hava týdning fyri átekningina av ársfrásøgnini.

## LEIÐSLUÁTEKNING

Leiðslan hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2023 hjá fótbóltsfelagnum EB/Streymur.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini, og uppsetingin er tillagað eftir krøvunum í FSF Loyvisreglugerð 2024.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísa mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2023 umframt av úrsliti felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Streymnes, tann 29/01 2024

Starvsnevnd:

| | |
|---|---|
| Rógvi Egilstoft<br>formaður | Egil á Bø<br>varaformaður |
| Djóni J. Eidesgaard<br>peningarøkil | Beinta Lisberg<br>nevndarlimur |
| Judith S. Jacobsen<br>nevndarlimur | |

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til nevndina í EB/Streymur**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá fótbóltsfelagnum EB/Streymur fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2023 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttum roknskaparhátti. Ársroknskapurin er gjørdur samsvarandi ársroknskaparlógini, og tillagað eftir krøvunum í FSF Loyvisreglugerð 2024.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini, og tillagað eftir krøvunum í FSF Loyvisreglugerð 2024.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina, og tillagað eftir krøvunum í FSF Loyvisreglugerð 2023. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir krevst fyri, at ársroknskapurin kann verða gjørdur uttan týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Týðandi óvissa um framhaldandi rakstur**
Uttan at tað hevur ávirkað niðurstøðu okkara, skulu vit gera vart við, at eginpeningur felagsins er negativur roknskapardagin, og at felagið hevur avmarkað tøkt gjaldføri. Víst verður til upplýsingarnar hjá leiðsluni í notu 12 „Framtíðarútlit" har leiðslan grundgevur fyri, at ársroknskapurin er uppsettur við framhaldandi rakstri fyri eyga.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanargerðir, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag

undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eyleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina fyri leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa, um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 29 / 1 / 2024

**MENTA Sp/f**
skrásettir grannskoðarar

Alvi S. S. Nielsen
skrásettur grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

Ársfrásøgnin hjá EB/Streymur fyri 2023 er gjørd eftir ásetingunum fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini. Umframt er uppsetingin tillagað eftir krøvunum í FSF Loyvisreglugerð 2024.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.
Upphæddirnar í ársfrásøgnini eru í donskum krónum (DKK).

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarliga ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amorteraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

Møgulig marknaðarlig virðisminking á ognum í árinum verður mett ikki at verða varandi.

## Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða staðfestar.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Annar uttanhýsis kostnaður**
Annar uttanhýsis kostnaður eru kostnaðir í árinum til útbreiðslu, sølu, marknaðarføring, umsiting, fyrisiting, leigu, tap/vinning søla støðisogn og tap áogn.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður er lønir, samsýningar, frítíðarlønir, eftirlønir og almenn lønargjøld, umframt annan starvsfólkakostnað. Møgulig lønarendurgjøld eru mótroknað.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

## Fíggjarstøða

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum.

Útveganarvirði er kostnaður, ið beinleiðis er knýttur at íløguni fram til, ognin verður tikin í nýtslu. Útveganarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær er ymisk.

Útbúnaður fyri minni enn kr. 20.000 pr. eind verður kostnaðarførdur í útveganarárinum.

Avskrivingar eru grundaðar á væntaða brúkstíð (livitíð) og ásett restvirði (scrapvirði) og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keypsmánaði. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Rakstrartól og innbúgv: | 3-4 ár | 20% |

**Áogn**
Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

**Tíðarvmarkingar**
Tíðaravmarking verða gjørd fyri allar týðandi inntøkur og kostnaðir.

**Fremmand skuld**
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virðið roknskapardagin.

**Skattur**
Felagið hevur fingið játtað skattafrælsið.

menta
skrásettir grannskoðarar

# RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar - 31. desember

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Atgongumerkjasøla | 1 | 226.660 | 238.585 |
| Sponsorat og lýsingar | 2 | 712.050 | 988.200 |
| Útvarp og sjónvarp | | 100.000 | 21.757 |
| Handil | 3 | 155.041 | 206.612 |
| UEFA solidaritetur og vinningur frá kappingum | | 0 | 151.027 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | | 2.386.640 | 1.623.155 |
| **Inntøkur** | | **3.580.391** | **3.229.335** |
| Vørunýtsla | 4 | -106.821 | -187.864 |
| Aðrir rakstrarkostnaðir | 5 | -1.347.814 | -1.602.014 |
| **Bruttovinningur** | | **2.125.756** | **1.439.457** |
| Starvsfólkakostnaður | 6 | -2.026.127 | -2.194.313 |
| **Rakstraravlop** | | **99.630** | **-754.856** |
| Av- og niðurskrivingar av støðisogn | 7 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarliga postar** | | **99.630** | **-754.856** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 0 | 0 |
| Fíggjarligar útreiðslur | | -33.612 | -27.274 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **66.018** | **-782.130** |
| Skattur av ársúrslitinum | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **66.018** | **-782.130** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Onnur rakstrartól og innbúgv | | 4.633 | 4.633 |
| **Materiell støðisogn** | 7 | **4.633** | **4.633** |
| **Støðisogn** | | **4.633** | **4.633** |
| **Vørugoymsla** | | **6.210** | **6.210** |
| Áogn av sølu og tænastu | | 308.675 | 137.978 |
| Onnur áogn | | 4.000 | 4.000 |
| **Áogn** | | **312.675** | **141.978** |
| **Tøkur peningur** | | **125.891** | **166.599** |
| **Ogn í umferð** | | **444.776** | **314.787** |
| **OGN SAMANTALT** | | **449.409** | **319.420** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| Eginpeningur | | -658.072 | -724.090 |
| **Eginpeningur** | 8 | **-658.072** | **-724.090** |
| Lánistovnar | 9 | 445.222 | 0 |
| **Langfreistað skuld** | | **445.222** | **0** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 9 | 25.000 | 0 |
| Lánistovnar | 10 | 0 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 414.592 | 562.468 |
| Skuld frá leikaraflyting | | 15.000 | 0 |
| Skuld til starvsfólk | | 177.349 | 76.020 |
| Skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | | 7.871 | 6.828 |
| Onnur skuld | | 22.448 | 398.194 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **662.259** | **1.043.510** |
| **Skuld** | | **1.107.481** | **1.043.510** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | | **449.409** | **319.420** |
| **Netto ogn/skuld** | | **-658.072** | **-724.090** |
| Veðsetingar, trygdarveitingar og eventualskyldur | 11 | | |
| Framtíðarútlit | 12 | | |

menta
skrásettir grannskoðarar

# PENINGASTREYMSYVIRLIT

| | 2023 | 2022 |
|---|---:|---:|
| | kr. | kr. |
| Úrslit áðrenn rentur | 99.630 | -754.856 |
| Avskrivingar | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri áðrenn broytingar í arbeiðskapitali** | **99.630** | **-754.856** |
| Broyting í áogn | -170.698 | -14.008 |
| Broyting í ognarum | -147.877 | 243.643 |
| Broyting í goymslu | 0 | 0 |
| Broyting í aðrari skuld | -258.374 | 420.964 |
| **Peningastreymur frá primerum rakstri** | **-477.319** | **-104.257** |
| Rentuinntøkur | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | -33.612 | -27.274 |
| **Peningastreymur frá rakstri** | **-510.931** | **-131.531** |
| Søla av ognarførdum leikarum | 0 | 0 |
| Keyp av ognarførdum leikarum | 0 | 0 |
| Søla av materiellari støðisogn | 0 | 0 |
| Keyp av materiellari støðisogn | 0 | 0 |
| Aðrar broytingar í tøkum peningi frá íløgum | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá íløgum** | **0** | **0** |
| Upptøka ella hækkan av láni | 0 | 0 |
| Avdráttir upp á langfreistaðaskuld | 470.222 | -26.016 |
| Broytingar í tøkum peningi frá fígging | 0 | -124.838 |
| **Peningastreymur frá fígging** | **470.222** | **-150.854** |
| Broytingar í tøkum peningi frá øðrum virksemi | 0 | 0 |
| **Peningastreymur frá øðrum virksemi** | **0** | **0** |
| **Peningastreymur tilsamans fyri tíðarskeiðið** | **-40.709** | **-282.385** |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | 166.599 | 448.985 |
| Tøkur peningur við árslok | 125.891 | 166.599 |
| Tøkur peningur sambært fíggjarstøðu | 125.891 | 166.599 |

# NOTUR

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Nota 1. Atgongumerkjasøla** | | |
| Heimligu kappingarnar | 226.660 | 231.935 |
| UEFA-kapping | 0 | 6.650 |
| | **226.660** | **238.585** |
| **Nota 2. Sponsorat og lýsingar** | | |
| Høvuðsstuðul | 200.000 | 338.000 |
| Lýsingar við vøllin | 147.050 | 164.250 |
| Annar stuðul og lýsingar | 365.000 | 485.950 |
| | **712.050** | **988.200** |
| **Nota 3. Handil** | | |
| Heimligu kappingarnar | 155.041 | 206.612 |
| | **155.041** | **206.612** |
| **Nota 4. Vørunýtsla** | | |
| Vørukeyp | -106.821 | -187.864 |
| | **-106.821** | **-187.864** |
| **Nota 5. Aðrir rakstrarkostnaðir** | | |
| Útreiðslur á leikdegi | -108.601 | -89.547 |
| Útreiðslur til stuðlar og lýsingar | -6.070 | -7.350 |
| Útreiðslur til handil | -106.821 | -187.864 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -1.126.322 | -1.317.253 |
| | **-1.347.814** | **-1.602.014** |

menta
skrásettir grannskoðarar

| | 2023 | 2022 |
|---|---:|---:|
| | kr. | kr. |
| **Nota 6. Starvsfólkakostnaður** | | |
| | | |
| **Leikarar** | | |
| Lønir | -1.140.299 | -1.729.924 |
| Lønartengd gjøld | -41.470 | -87.662 |
| | -1.181.769 | -1.817.586 |
| | | |
| **Onnur starvsfólk** | | |
| Lønir | -799.000 | -319.727 |
| Lønartengd gjøld | -45.358 | -57.000 |
| | -844.358 | -376.727 |
| | **-2.026.127** | **-2.194.313** |

**Nota 7. Materiell støðisogn**

| | Leikvøllur | Bygningar | Onnur rakstrartól og innbúgv | Til samans |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Keypsvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 23.166 | 23.166 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Keypsvirði við árslok | 0 | 0 | 23.166 | 23.166 |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Uppskrivingar við árslok | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | -18.533 | -18.533 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar viðvíkjandi seldum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Av- og niðurskrivingar við árslok | 0 | 0 | -18.533 | -18.533 |
| **Roknskaparligt virði** | **0** | **0** | **4.633** | **4.633** |
| Avskrivingartíðaskeið | | | 3-4 ár | |

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Nota 8. Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 0 | 0 |
| Grunnar | 0 | 0 |
| | 0 | 0 |
| Fluttur vinningur við ársbyrjan | -724.090 | 58.040 |
| Ársúrslit | 66.018 | -782.130 |
| Fluttur vinningur við árslok | -658.072 | -724.090 |
| | | -0 |
| **Eginpeningur 31.12.2023** | **-658.072** | **-724.090** |
| **Nota 9. Langfreistað skuld til lánistovnar** | | |
| Skuld til lánistovnar | 470.222 | 0 |
| Herav avdráttir komandi ár | -25.000 | 0 |
| | **445.222** | **0** |
| **Nota 10. Lánistovnar** | | |
| Kassakredittur | 0 | 0 |
| Onnur lán | 0 | 0 |
| | **0** | **0** |

**Nota 11. Veðsetingar, trygdarveitingar og eventualskyldur**
Felagið hevur hvørki veð- ella tygdarveitingar við roknskaparárslok. Tó eventualskyldur við sáttmálaskyldum mótvegis leikarum og venjarum. Harumframt hevur felagið afturgjaldsskyldur mótvegis lánsveitara.

**Nota 12. Framtíðarútlit**
Nevndin ásannar at eginpeningur felagsins er negativur við 658 tkr. roknskapardagin. Nevnd felagsins væntar í løgdu rakstrar- og gjaldførisætlan fyri 2024 at økja um inntøkur og tillaga rakstrarkostnaðin enn meira komandi ár. Við hesum átøkum metur leiðslan útlit verða fyri framhaldandi avlopi frá rakstri komandi árini og soleiðis endurvinna eginpeningin aftur við avlopi frá rakstri komandi árini.

Nevnd ásannar somuleiðis, at felagið hevur avmarkað gjaldføri við roknskaparlok. Neyðugt er at betrast má um grundrakstur og gjaldførið til framhaldandi rakstur. Arbeitt verður við at útvega felagnum neyðugt gjaldføri í komandi ári.

## NOTUR UTTAN TILVÍSING

**Kapitalpartar**
Felagið hevur ikki gjørt íløgur í kapitalpartar í øðrum feløgum.

**Avsetingar**
Felagið hevur ikki avsetingar við árslok.

**Ráðandi felag**
Onki annað felag hevur ræði á ella stýrir felagnum.

**Transaktiónir við nærstandandi partar**
Felagið hevur ikki havt transaktiónir við nærstandandi partar í roknskaparárinum, sum ikki hava verið til marknaðartreytir.